LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 14. desember 2018
J.Nr.: LUM-28- 18/00048-35
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðv. klagu um, at Tórshavnar kommuna noktar at seta áður uppsagt starvsfólk í starv aftur

Við skrivi, dagfest 22. mars 2018, hevur Heilsurøktarafelagið sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Vit skulu við hesum heita á Løgtingsins umboðsmann um at taka upp málið í samband við, at limur okkara A hevur søkt starv sum heilsurøktari á B, men hevur fingið noktandi svar upp á umsókn sína.
>
> Vit meta ikki, at grundgevingin fyri at nokta A starv er sakliga grundað, og vit senda í hesum sambandi avrit av skrivi, sum vit sendu Tórshavnar kommunu tann 20. februar 2018 og avrit av skrivi, sum Tórshavnar kommuna hevur sent felag okkara tann 8. mars 2018.
>
> Tað, sum vit gera galdandi, er, at kommunan ikki hevur lagt nokk dent á:
>
> -Fakliga høgu førleikarnar hjá A
> -At setanarbólkurin hevur mælt til at seta A í starvið
> -At A í gott og væl eitt hálvt ár hevur røkt starv sum heilsurøktari á B
> -At bæði brúkarar og avvarðandi hava verið sera nøgd við tað arbeiði, sum A hevur gjørt á B
> -At starvsfelagarnir eisini eru væl nøgdir við A sum starvsfólk á B
>
> Hetta merkir, at tíðin, sum A hevur arbeitt á B, hevur víst, at hon fult út er før fyri at røkja hetta starv, og at hon ongar trupulleikar yvirhøvur hevur, hvørki við brúkarum, avvarðandi ella starvsfeløgum sínum.
>
> Undir hesum umstøðum meta vit ikki, at tað er sakliga grundað, at Tórshavnar kommuna dregur fram eitt eldri mál og leggur avgerandi dent á tað, sum tá fór fram,

í staðin fyri at seta fokus á tað, sum veruliga hevur týdning í samband við slíka starvssetan, nevniliga, at umsøkjarin er fakliga førur fyri at røkja starvið, og at hendan tíð, hon hevur arbeitt á B, vísir, at hon eisini hevur gott samstarv bæði við brúkarar, avvarðandi og starvsfelagar sínar.

Vit skulu serliga vísa á, at okkum kunnugt er einki fordømi, sum kann stuðla kommununi í, at tey skulu kunna leggja avgerandi dent á eina einstaka hending og harvið í veruleikanum seta ávíst starvsfólk á svartalista, uttan at fyrihalda seg til, at allar sakligar upplýsingar, sum dentur eigur at verða lagdur á, tala fyri, at A er fult før fyri at røkja tað starv, sum hon ikki bara hevur søkt, men sum hon eisini í longri tíð hevur røkt uttan at nakar kann seta ein fingur á arbeiði hennara ella samstarvsevni hennara.

Ikki minst tá ein samdur setanarbólkur hevur mælt til at seta A í starv, halda vit, at tað ber ikki til, at kommunan noktar at seta hana í starv, tí um kommunan veruliga kann loyva sær at síggja burtur frá øllum sakligum grundgevingum, so er rættartrygdin hjá starvsfólkunum av álvara í vanda."

## Málsgongd

Í januar 2017 varð A søgd úr starvi sum heilsurøktari á B. Undan hesum hevði Tórshavnar kommuna í august 2016 flutt starvsstað hennara av D á B. Hon byrjaði tó ongantíð í starvinum á B. Samanumtikið var grundgevingin fyri at siga hana úr starvi, at Tórshavnar kommuna hevði mist álitið á hana eftir framferðina í sambandi við og aftaná, at avgerð varð tikin um at flyta starvsstaðin av D á B.

Í oktober 2017 byrjaði A sum tímaløntur heilsurøktari á B.

Í januar 2018 varð fast starv sum heilsurøktari á B lýst leyst at søkja. A var einasti umsøkjari til starvið. Til setanarsamrøðuna, sum varð hildin tann 31. januar, vóru umframt deildarleiðarin fyri B álitisfólkið og eitt starvsfólk. Setanarbólkurin var samdur um at mæla til at seta A í starvið. Í niðurstøðuni varð m.a. víst á, at hon hevði starvast á B í knappar fýra mánaðir, og at hetta hevði gingið væl.

Sambært Tórshavnar kommunu eru eingi skjøl, sum lýsa samskiftið millum deildarleiðaran á B og Heilsu- og umsorganartænastuna hjá Tórshavnar kommunu um tilmælið at seta A í starv, men tann 6. februar 2018 sendi eindarleiðarin á Heilsu- og umsorganartænastuni hjá Tórshavnar kommunu A soljóðandi svar uppá umsóknina:

"**Viðv. starv sum heilsurøktari á B**
Vísandi til umsókn tygara sum heilsurøktari á B verður við hesum boðað frá, at Heilsu- og umsorganartænastan hevur avgjørt ikki at bjóða tygum starvið, hóast setanarbólkurin hevur tilmælt setan.

Hendan avgerð er grundað á, at Heilsu- og umsorganartænastan ikki hevur tað álit á tygum sum starvsfólk, sum er heilt grundleggjandi í viðurskiftunum millum starvsfólk og Tórshavnar kommunu sum arbeiðsgevari.

Vantandi álitið er grundað á atburð tygara í sambandi við málið viðvíkjandi flyting frá D til B, har tygum fóru út um alt mark fyri, hvat kann góðtakast av Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna metir, at tíðin enn ikki er búgvin til at bjóða tygum fast starv, og hetta viðførir sostatt, at tygum ikki verða sett í starv sum heilsurøktari á B í hesum umfari."

Tann 20. februar 2018 sendi Heilsurøktarafelagið vegna A Heilsu- og umsorganartænastuni í Tórshavnar kommunu soljóðandi skriv:

"**Viðv. A**
A hevur søkt starv sum heilsurøktari á B, har hon hevur starvast sum tímalønt seinasta hálva árið. Hon hevur verið til samtalu, og setanarbólkurin hevur valt, at hon skal setast í starvið og sent økisleiðsluni tilmæli.

Í skrivi tykkara, dagfest 6. februar 2018, boða tit frá, at Heilsu- og umsorganartænastan hevur avgjørt ikki at bjóða henni starvið sum heilsurøktari á B.

Grundgevingin er sambært skrivinum vantandi álit á A sum starvsfólk, og at hetta nærri grundar seg á tað, sum tit nevna "*atburðin… í sambandi við flyting frá D til B, har tygum fóru út um alt mark fyri, hvat kann góðtakast av Tórshavnar kommunu*."

Vit meta ikki hesa grundgeving vera sakliga, og skulu vísa á, at tað, sum Heilsu- og umsorganartænastan ikki tykist at hava lagt avgerandi dent á, er:

Fakligu høgu førleikarnar hjá A,
At setanarbólkurin hevur mælt til at seta A í starvið,
At A í longri tíð hevur røkt starv sum heilsurøktari á B,
At brúkararnir og avvarðandi eru væl nøgd við A sum starvsfólk á B,
At starvsfelagarnir eru væl nøgdir við A sum starvsfólk á B.

Vit duga ikki at síggja, at eitt meira enn eitt ára gamalt mál, skal kunna vekta so nógv, at setanarmyndugleikin skal skúgva til viks bæði arbeiðsførleikar og arbeiðsroyndir og ikki minst síggja burtur frá, at A, uttan nakrar sum helst trupulleikar, nú í longri tíð hevur røkt leyst starv sum heilsurøktari á B.

Her tykist í ávísan mun at vera talan um eina avgerð, sum er ætlað at vísa A, at málið frá 2017 enn ikki er gloymt, heldur enn sakliga at hava gjørt eina meting av, hvørt A er før fyri at røkja fast starv sum heilsurøktari ella ikki.

Vit meta hetta mál so avgerandi og prinsipielt, at vit hava avgjørt at royna at fáa umboðsmannin at taka málið upp til viðgerðar, men skulu í fyrstu atløgu heita á Heilsu- og umsorganartænastuna um at umhugsa málið enn einaferð, tí vit eru sannførd um, at við verandi grundgeving er ikki talan um eina avgerð sum byggir á neyðugu sakligu atlitini."

Tann 8. mars 2018 sendi Tórshavnar kommuna Heilsurøktarafelagnum soljóðandi skriv:

"**Viðvíkjandi avslag uppá umsókn sum heilsurøktari, A**
Víst verður til skriv tykkara, dagfest 20. februar 2018, har Heilsurøktarafelagið boðar frá, at tit ikki meta, at grundgevingin fyri ikki at seta A í fast starv á B, er saklig.

Í hesum sambandi vísa tit til ymisk viðurskifti, sum tit meta, at Tórshavnar kommuna átti at tikið atlit til.

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi viðmerkingar til skriv tykkara.

Setanarheimildin innan eldraøkið í Tórshavnar kommunu liggur hjá ovastu leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni. Harvið er tað leiðslan í Heilsu- og umsorganartænastuni, sum skal tryggja, at umsøkjarin, sum settur verður, samanumtikið lýkur øll førleikakrøvini til starvið.

Í eini setanartilgongd eru evni og vilji til samstarv krøv, sum viga líka nógv í samlaðu metingini av førleikum sum t.d. útbúgving og starvsroyndir.

Sum tað framgongur av avslagnum hjá A, og sum tit eisini viðmerkja í skrivi tykkara, er tað málið um flyting frá D til B, sum seinni endaði við eini uppsøgn, sum liggur til grund fyri, at leiðslan í Heilsu- og umsorganartænastuni ikki er sinnað at seta hana í fast starv á hesum sinni.

Atlit er í hesum tikið til, at atburðurin hjá A í hesum nevnda máli fór út um alt mark fyri, hvat man sum starvsfólk kann loyva sær, og at hesin atburður í síni heild varð vendur móti leiðandi persónum í Heilsu- og umsorganartænastuni, t.e. setanarmyndugleikanum.

Eisini er atlit tikið til, at tað einans er gingið eitt ár, síðan A varð søgd úr starvi vegna grovt álitisbrot, og tí er tíðin enn ikki búgvin til, at Tórshavnar kommuna metir seg hava orsøk til aftur at vísa A álit, við at seta hana í fast starv.

Tórshavnar kommuna metir tað eisini hava týdning, at ein ávaring, sum er eitt nógv minni starvsrættarligt stig enn uppsøgn, vanliga hevur virknað/gildi í áleið 2 ár, og tí metir Tórshavnar kommuna at ein uppsøgn, sum hvílir á so álvarsligum grundarlagi, í minsta lagi má hava gildi líka leingi sum ein ávaring.

Útgangsstøðið má tí verða, at A í rúma tíð enn má vísa vilja til at sannføra leiðsluna í Heilsu- og umsorganartænastuni um, at hon hevur skilt álvaran í, at man sum starvsfólk hevur skyldu at vísa sínum arbeiðsgevara loyalitet og samstarvsvilja.

At enda kann sigast, at tað, at eitt tilmæli frá eini setanarnevnd ikki verður fylgt av einum setanarmyndugleika, ikki er óvanligt, og verður í hesum ítøkiliga føri mett at verða sakliga grundgivið fyri.

Tórshavnar kommuna ger sostatt ikki meira við málið."

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 27. mars 2018, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Við teldubrævi 1. mai 2018 játtaði umboðsmaðurin umbøn frá Tórshavnar kommunu at leingja freistina til 14. mai 2018.

Við skrivi, dagfest 22. mai 2018, heitti umboðsmaðurin á Tórshavnar kommunu um at senda sær umbidnu frágreiðingina og skjøl beinanvegin.

Tann 4. juni 2018 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"**Viðvíkjandi klagu frá Heilsurøktarafelagnum vegna A**
Víst verður til skriv tykkara, dagfest 27. mars 2018, har biðið verður um frágreiðing um grundarlagið undir avgerðini at sýta at seta A í fast starv á B hóast eitt einmælt tilmæli frá setanarbólkinum.

Sum tað framgongur av avgerðini, sum varð send A tann 8. mars í ár, var avgerðin um ikki at fylgja tilmælinum hjá setanarbólkinum grundað á, at leiðslan á Heilsu- og umsorganartænastuni ikki hevur álit á A eftir atburðin, sum hon vísti í sambandi við, at avgjørt varð, at hon skuldi flyta frá E á D til B at arbeiða, sum avleiðing av ógvusligum samstarvstrupulleikum á D, sum A átti ein avgerandi leiklut í.

Heilsurøktarafelagið kærdi hesa avgerð til Tórshavnar kommunu, sum var samd við leiðsluni í Heilsu og umsorganartænastuni í, at tíðin ikki var búgvin til, at leiðslan átti at hava endurvunnið álitið á A, og at hon tí mátti góðtaka, ikki at verða sett í fast starv á hesum sinni.

Í hesum sambandi varð, í aftursvarinum til Heilsurøktarafelagið, nevnt, at A "í rúma tíð enn má vísa vilja at sannføra leiðsluna í Heilsu- og umsorganartænastuni um, at hon hevur skilt álvaran í, at man sum starvsfólk hevur skyldu at vísa sínum arbeiðsgevara loyalitet og samstarvsvilja."

Eisini varð nevnt, at Tórshavnar kommuna metir, at ein uppsøgn, sum er eitt nógv álvarsligari starvsrættarligt stig enn ein ávaring, í minsta lagi eigur at hava gildi í líka langa tíð.

Sum tað greitt framgongur, er talan í báðum útsøgnum um eina fyrisitingarliga meting, sum er grundað á álvaran í málinum um flyting, sum endaði sum ein uppsøgn, sum nú er orsøk til, at Heilsu og umsorganartænastan ikki vil seta A í fast starv. Víst verður í hesum sambandi til hjáløgdu uppsøgn, dagfest 31. januar 2017, har tað framgongur, at Tórshavnar kommuna er av tí áskoðan, at A er sinnað at taka øll hugsandi amboð í nýtslu, fyri at fremja egin áhugamál. Vert er serliga at nevna, at A meldaði táverandi deildarleiðara sín til løgregluna fyri skjalafalsan - ein sera álvarslig ákæra, sum løgreglan varð samd við Tórshavnar kommunu í, at onki grundarlag varð fyri, og tí avvísti.

Ein ávaring hevur, sambært rættarpraksis, vanliga gildi í eini tvey ár, og kann sostatt nýtast til at taka starvsrættarlig stig innan sama slag av tænastubroti, í áleið tvey ár. At ein uppsøgn, sum er grundað á álvarslig tænastubrot og grovt illoyalan atburð, má metast at kunna nýtast sum grundarlag fyri at sýta nýggjari setan í eina rúma tíð (har ein ítøkilig meting má gerast í hvørjum einstøkum føri), metir Tórshavnar kommuna verða í “sagens natur”. At talan skal verða um tvey ár, er sostatt ein fyrisitingarlig meting.

Eydnast hevur ikki verið at funnið rættarpraksis hesum viðvíkjandi, helst tí at hendan støðan, har eitt starvsfólk søkir starv hjá sama arbeiðsgevara, sum viðkomandi hevur meldað til løgregluna og er blivið sagt úr starvi av, má metast at verða óvanlig, og tí hvílir omanfyri endurgivna útsøgnin eisini á eini fyrisitingarligari meting.

Eisini er vert at leggja til merkis, at tað júst var B, sum A ikki vildi góðtaka at verða flutt á, og beinleiðis noktaði at fylgja tænastuboðum um at møta til arbeiðis á. Neyvt sami stovnur, sum hon nú vil setast í fast starv á.

Tórshavnar kommuna metir, at hetta staðfestir metingina av, at A ikki virðir ovastu leiðsluna í Heilsu- og umsorganartænastuni við at krevja at verða sett í fast starv á einum stovni, hon fyri bert góðum ári síðani noktaði at fylgja tænastuboðum viðvíkjandi.

A velur enn einaferð at nokta at fylgja eini avgerð hjá leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, og tekur sostatt enn ein “dyst” móti at kalla somu leiðslu sum seinast.

Uppá fyrispurning umboðsmansins um møguleikarnar hjá A at vísa vilja til samstarv v.m. er sostatt at siga, at A kundi víst virðing fyri leiðsluni i Heilsu- og umsorganartænastuni við at hildið áfram sum tímalønt í eina (ikki defineraða) tíð enn, tá leiðslan jú hevur víst A ta vælvild at loyva henni inn á Eldraøkið aftur at starvast sum tímalønt, hóast Tórshavnar kommuna ikki metir seg hava nakra skyldu

> yvirhøvur fyribils at bjóða A starv. Í øðrum lagi kundi A valt at arbeitt uttanfyri setanarøkið hjá Tórshavnar kommunu í eina tíð fyri at vísa, at hon er sinnað at lata frið valda millum partarnar og soleiðis verða við til at byggja álitið aftur.
>
> Samanumtikið hevur málið hjá A viðvíkjandi flyting og eftirfylgjandi uppsøgn verið eitt tað tyngsta starvsfólkamálið hjá Tórshavnar kommunu í nýggjari tíð, sum Tórshavnar kommuna hevur lagt ómetaliga nógva orku í.
>
> At A longu nú velur at reisa enn eitt mál móti leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, staðfestir enn einaferð, at A annaðhvørt ikki vil, ella megnar, samstarv við leiðsluna. Og við hesum staðfestir A sjálv, at Tórshavnar kommuna onga orsøk hevur at hava álit á henni.
>
> At enda kann eisini staðfestast, at tá setanarbólkurin á B einmælt tilmælti leiðsluni at seta A í fast starv, er hetta grundað á, at setanarbólkurin ikki kendi til málið/málini frammanundan, og sostatt hevur leiðslan í Heilsu- og umsorganartænastuni víst A loyalitet við at tryggja, at hennara atburður móti leiðsluni ikki er vorðin kendur úti í skipanini.
>
> Hjáløgd eru umbidnu skjølini í málinum umframt útskrift av skjalayvirlitinum í HR-skipanini.”

Tann 5. juni 2018 heitti umboðsmaðurin á Tórshavnar kommunu um at senda sær skjølini í sjálvum setanarmálinum viðvíkjandi starvinum og annað møguligt skrivligt tilfar í hesum sambandi. Tann 6. juni 2018 móttók umboðsmaðurin umsóknina og innanhýsis viðgerðina hjá leiðsluni á B av umsóknini. Sambært Tórshavnar kommunu er einki skrivligt tilfar frá samskifti millum deildarleiðaran á B og eindarleiðaran í Heilsu- og umsorganartænastuni viðv. avgerðini hjá leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni um ikki at fylgja tilmælinum hjá setanarbólkinum.

Við skrivi, dagfest 15. juni 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 28. juni 2018 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “Í samband við viðmerkingar frá Tórshavnar kommunu dagfestar 4. juni 2018 skulu vit boða frá, at vit ikki meta, at hesar viðmerkingar kunnu stuðla avgerðini um at nokta A fast starv.
>
> Tað, sum er umráðandi at hava í huga, er, at Tórshavnar kommuna er gingin beint ímóti teimum tilmælum, sum eru komin frá setanarnevndini, og vit halda ikki, at nakað av tí, sum Tórshavnar kommuna førir fram, kann grunda avgerð teirra, sum vit meta, ikki er sakliga undirbygd.

Vit hava annars hesar ítøkiligu viðmerkingar til tað, sum Tórshavnar kommuna skrivar í br ævinum frá 4. juni 2018.

**Viðv. sjónarmiðinum um, at leiðslan fyri Heilsu- og umsorganartænastuni ikki hevur álit á A, og at tíðin ikki er búgvin til, at leiðslan átti at havt endurvunnið álitið á A**

Vit skulu her minnast til, at A í fleiri mánaðir hevur starvast á B, og at bæði starvsfelagar og brúkarar hava fult álit á henni.

Leiðslan fyri Heilsu- og umsorganartænastuni tykist als ikki at hava lagt dent á hesi heilt avgerandi viðurskifti, sum setanarbólkurin m.a. hevur lagt dent á. Tí byggir avgerðin um at nokta A (starv, *mín viðm.*) ikki á sakligar grundir.

Tað er ikki nokk hjá einum fyrisitingarmyndugleika at vísa á, at ***"tíðin ikki er búgvin til, at leiðslan átti at havt endurvunnið álitið á A"***, tí tað er ein heilt grundleggjandi fyrisitingarlig regla, at ein avgerð (eisini avgerðin um at nokta A starv) skal byggja á sakligar grundgevingar.

At føra fram, at leiðslan fyri Heilsu- og umsorganartænastuni, sum ikki hevur sama innlit sum starvsfelagar og brúkarar í, hvussu A hesar nógvu mánaðirnar hevur røkt starv sítt á B, er ikki sannførandi, og lýkur ikki krøvini til eina sakliga grundgeving fyri avgerðini, sum gongur beint ímóti tilmælinum frá einari samdari setanarnevnd.

Kommunan tykist ikki at vilja fyrihalda seg til, at A fyrst í nógv ár hevur røkt starv hjá kommununi á ein fyrimyndarligan hátt og nú aftur hevur røkt starv á B, har bæði starvsfelagar og brúkarar hava alt gott at bera henni.

**Viðv. sjónarmiðinum um, at ein uppsøgn, sum er eitt nógv meira álvarsligt starvsrættarligt stig enn ein ávaring, í minsta lagi eigur at hava gildi í líka langa tíð.**

Hesar viðmerkingar hjá kommununi benda greitt á, at kommunan hevur sett meting undir reglu (skøn under regel), og tí er avgerðin ógildig.

Kommunan hevur tikið avgerð um, at eitt starvsfólk, sum áður er sagt úr starvi grundað á uppáhald um samstarvstrupulleikar, ikki skal hava starv, sum starvsfólkið hevur søkt, uttan at kommunan hevur fyrihildið seg til, hvat starvsfelagar, brúkarar og ein samd setanarnevnd siga. Kommunan hevur tí ikki fyrihildið seg til viðurskifti, sum í øllum setanarmálum eiga at vera avgerandi, nevniliga um umsøkjarin hevur førleikar at røkja starvið.

**Viðv. sjónarmiðinum um at talan í báðum førum er um ein fyrisitingarlig meting**

Hetta er eitt uppáhald, sum einki grundarlag er fyri.

Veruleikin er sum nevnt omanfyri, at kommunan hevur sett "meting undir reglu", tí tað ber ikki til at siga, at starvsfólk skal hava "karantenu" í t.d. 2 ár, áðrenn

starvsfólkið kann setast aftur í starv hjá kommununi, uttan ítøkiliga at fara inn í málsviðgerð, har t.d. mett verður um, hvussu A hevur røkt starvið frammanundan, at hon varð søgd upp, og nú nógvu seinastu mánaðirnar á B, har hon nú starvast sum tímalønt.

Tað, sum eisini hevur týdning her, er, at vit liva í einum lítlum samfelag, har starvsmøguleikarnir eru avmarkaðir, og tí rakar tað ræ̈ttiliga meint, um kommunan, uttan haldgóða grund, noktar A fast starv, hóast kommunan als ikki hevur gjørt galdandi, at A ikki hevur førleikar at røkja starvið.

**Viðv. sjónarmiðinum um, at A er sinnað at taka øll hugsandi amboð í nýtslu fyri at fremja egin áhugamál**

Hetta er ein rættiliga álvarslig ákæra móti A, og tað, sum kommunan ikki nevnir, er, at upprunin til alt stríðið var, at leiðslan hevði tikið avgerð um at seta annan persón í starvið hjá A, meðan hon var í summarfrí.

Hetta varð gjørt uttan hoyring, og tí var greitt talan um álvarslig brot á, ikki bara vanligar grundleggjandi fyrisitingarligar reglur, men A hevði als ikki fingið fráboðan um hesa avgerð frammanundan, og tað er helst brot á vanligan góðan leiðslusið.

Vit halda, at tað er átaluvert, at kommunan ikki sigur alla søguna, nú tey skulu gera viðmerkingar til alla tilgongdina.

**Viðv. sjónarmiðinum um, at ”talan skal verða um tvey ár, er sostatt ein fyrisitingarlig meting”**

At kommunan kallar avgerðina eina “fyrisitingarliga meting”, at A skal hava karantenu í 2 ár, er enn eitt prógv um, at meting er her set undir reglu (skøn under regel).

Orsøkin til at kommunan kallar hetta eina fyrisitingarliga meting er helst at sleppa undan, at tilgongdin verður kannað av umboðsmanninum, men veruleikin er, at tað at geva A karantenu undir øllum umstøðum er ein avgerð, sum umboðsmaðurin eigur at kanna, tí kommunan hevur als ikki verið inni og gjørt eina heildarmeting, m.a. út frá teimum fakligu førleikum, A hevur, og royndirnar bæði undan uppsøgnini í 2017, og nú hon hevur starvast sum tímalønt á B.

**Viðv. viðmerkingunum um, at tað júst var B, sum A ikki vildi góðtaka at verða flutt til**

Kommunan kann neyvan í álvara meina, at A ikki skal kunna fáa starv á B, tí hon áður hevur noktað at vilja góðtaka at verða flutt av sínum táverandi arbeiðsplássi.

Støðan tók seg sum nevnt upp, tá A í 2016 kom aftur úr summarfrí og frætti, at annað starvsfólk varð sett í hennara starv. Er tað ikki natúrlig reaktión at seta seg ímóti at verða flutt til heilt annað starvsstað og heilt aðrar arbeiðsuppgávur?

**<u>Viðv. sjónarmiðinum um, at ”A kundi havt víst virðing fyri leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni við at hildið áfram sum tímalønt eina (ikki defineraða) tíð enn.</u>**
Vit skilja ikki hesi sjónarmið. Meinar kommunan, at eitt starvsfólk skal vísa slíka virðing fyri leiðslu sínari, at hon/hann ikki skal royna at tryggja sær fasta starvssetan?

Hetta eru sjónarmið, sum hvørki kunnu byggja á sakliga fyrisitingarliga málsviðgerð, ella á starvsfólkarættarliga reglur.

Umsóknin hjá A hevur sjálvsagt einki sum helst við tørvandi virðing fyri leiðsluni at gera, men tað er ein demokratiskur rættur hjá øllum borgarum at søkja um fasta starvssetan. Rættartrygdin er av álvara í vanda, um land ella kommunur skulu royna (ella meina), at virðingin fyri stovnsleiðslu skal fáa borgarar frá at søkja um fast starv uttan mun til, hvørjar hendingar eru farnar fram frammanundan.

**<u>Viðv. sjónarmiðinum um, at “A longu nú velur at reisa eitt mál ímóti leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, staðfestir enn einaferð, at A annaðhvørt ikki vil, ella megnar, samstarv við leiðsluna.</u>**
Vit eru rættiliga bilsin av, at ein kommuna skal føra fram, at tað, at leggja eitt mál fyri Løgtingsins umboðsmann, skal skiljast sum ein staðfesting av, at A annaðhvørt ikki vil ella megnar samstarv.

Bara at reisa hendan spurning meta vit er greitt brot á vanligar fyrisitingarligar reglur, tí um vit taka viðmerkingarnar hjá kommununi fyri áljóðandi, so kann tað væl hugsast, at hetta mál, sum nú er til viðgerðar hjá umboðsmanninum, fer at gera tað enn truplari hjá A at fáa fasta starvssetan hjá Tórshavnar kommunu, tí eftir hugsanini hjá umsitingini hjá kommununi er hetta í sjálvum sær staðfesting av manglandi vilja/evni at samstarva.

Hetta er eitt veruligt álvarsmál, og vit skulu tí heita á umboðsmannin um at gera eina meting av, um tað er í samsvar við góðan fyrisitingarsið, at kommunan skrivar, at kæran til umboðsmannin skal kunnu skiljast sum, at A annaðhvørt ikki vil ella megnar samstarv við leiðsluna.

Legg merki til, at kommunan ikki (“ikki”, helst komið skeiv fyri, *mín viðm.*) skrivar “***staðfesting av”*** og ikki ein ábending, so her tykist kommunan at hava gjørt sær sína greiðu niðurstøðu, og um hetta veruliga er rætt, so kunnu øll starvsfólk hjá kommununi væl vænta, at tey verða løgd undir ikki at vilja ella megna samstarv, um tey heita á umboðsmannin um at kanna eitt mál. At heita á umboðsmannin um at kanna mál er rætturin hjá øllum borgarum landsins, og tað er rættiliga álvarsligt, tá ein kommuna skal kalla hetta ikki vilja ella megna at samstarva við leiðsluna.

**<u>Samandráttur</u>**
Samanumtikið er greitt, at kommunan ikki sakliga hevur viðgjørt hetta mál, men hinvegin hevur brúkt eina hending í 2016/2017 at geva A “karantenu” í, sum vit

> skilja, minst 2 ár, og kommunan hevur fullkomiliga sett til viks (uttan nærri frágreiðing) einmælta tilmælið frá samdari setanarnevnd.
>
> Heldur ikki hevur kommunan fyrihildið seg til sannroyndina, at A hevur góðar fakligar førleikar, og at hon bæði undan hendingini í 2017 og nú í fleiri mánaðir, hevur røkt starv sítt uttan nakra sum helst trupulleikar.
>
> Tí er greitt, at avgerðin um at nokta A starv er ógildig.
>
> Afturat hesum kunnu vit staðfesta, at kommunan hevur úttalað seg um, at tey meta kæruna til umboðsmannin "*staðfestir enn einaferð, at A annaðhvørt ikki vil, ella megnar, samstarv við leiðsluna"*. Hetta kann ikki vera rætt, og tí heita vit á umboðsmannin um at meta um hesa staðfesting hjá kommununi."

Við skrivi, dagfest 15. august 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Við skrivi, dagfest 17. september 2018, minti umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu á málið.

Við skrivi, dagfest 1. oktober 2018, boðaði umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu frá, at av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá kommununi um málið, fór umboðsmaðurin í næstum undir endaligu viðgerðina av málinum við støði í teimum skjølum, frágreiðingum og viðmerkingum, sum vóru til skjals í málinum.

Tann 2. oktober 2018 boðaði Tórshavnar kommuna frá, at skrivini frá umboðsmanninum vóru dottin burtur ímillum, men at arbeitt var við at svara umboðsmanninum, og tann 4. oktober 2018 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **"Viðvíkjandi klaguni frá Heilsurøktarafelagnum vegna A, ..**
> Víst verður til skriv tykkara, dagfest ávikavist 1. oktober, 17. september og 15. august, har biðið verður um viðmerkingar til skrivið frá Heilsurøktarafelagnum, dagfest 28. juni 2018.
>
> Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi viðmerkingar til skrivið frá Heilsurøktarafelagnum:
>
> <u>Ad. 1. pkt.</u>
> Heilsurøktarafelagið fer ikki skeivt, tá ført verður fram, at Tórshavnar kommuna ikki metir tað hava týdning fyri ítøkiliga málið, hvussu A hevur røkt sítt starv, áðrenn málið um samstarvstrupulleikar, sum endaði við eini uppsøgn, uppstóð.
>
> Tórshavnar kommuna metir, at atburðurin í sambandi við hetta málið var so langt út um mark fyri, hvat eitt starvsfólk kann loyva sær, eisini um atlit verður tikið til, at støðan var tyngjandi fyri A, at tað væl kann standa einsamalt í metingini, í mun til fasta setan.

Heilsurøktarafelagið fer tó skeivt, tá talan er um atlit til, hvussu A hevur røkt starvið eftirfylgjandi á B.

Tórshavnar kommuna hevur noterað sær, at tað eftir øllum at døma ikki hava verið trupulleikar í samstarvinum millum leiðsluna á B og A, og sum tað framgongur av frágreiðingini hjá Tórshavnar kommunu til umboðsmannin, dagfest 4. juni í ár, hevði tað einans kravt eina tíð enn við hesi gongd, til leiðslan á Heilsu- og umsorganartænastuni aftur kundi kenna seg trygga við A.

Ad. 2. pkt.
Uppáhaldið hjá Heilsurøktarafelagnum um meting undir reglu, má vera ein misskiljing, tí talan júst ikki er um eina yvirskipaða meginreglu/mannagongd, sum uttan fyrilit verður fylgd, men ein ítøkilig meting í hesum ítøkiliga føri, við støði í einum tí tyngsta starvsfólkamáli, sum Tórshavnar kommuna hevur havt í nýggjari tíð.

...

Tórshavnar kommuna metir, at samstarv og loyalitetur mótvegis ovastu leiðsluni á Heilsu- og umsorganartænastuni avgjørt er ein týðandi partur í metingini av, hvørt A hevur førleikar til at røkja eitt starv. Havast skal í huga, at tað júst er vegna leiðsluna, A skal røkja starvið, og tí er tað leiðslan, sum má hava fult álit á henni.

Ad. 3. Pkt.
Víst verður til pkt. 2.

Ad. 4. pkt.
Víst verður til málið um flyting, sum víst til omanfyri undir pkt. 2, har Løgtingsins umboðsmaður hevur fingið allar upplýsingar um tilgongdina um flyting.

Ad. 5. pkt.
Vist verður til pkt. 2.

Ad. 6. pkt.
Við einum starvsfólkahópi, ið telur nærum 2000 fólk, hevur Tórshavnar kommuna við jøvnum millumbilum mál um samstarvstrupulleikar, har flyting í nøkrum førum er neyðug. Og sum nevnt omanfyri hevði A ein atburð í mun til flytingina, sum Tórshavnar kommuna at kalla ongantíð hevur upplivað líka til, bæði áðrenn og aftaná hetta málið.

Vísandi til, at ein flyting var minsta inntrivið, sum Tórshavnar kommuna kundi taka til í málinum, verður mett, at atburðurin hjá A á ongan hátt stóð mát við avgerðina hjá Tórshavnar kommunu.

Ad. 7. pkt.
Tað er púra rætt, sum Heilsurøktarafelagið førir fram, at tað er ein demokratiskur rættur at søkja eitthvørt starv.

Tað, sum Tórshavnar kommuna sipar til í hesum sambandi, er, at vantandi sjálvsinnlitið hjá A, tá hon ikki sjálv dugir at síggja, at hennara atburður í sambandi við málið um flyting, fór út um alt mark og tí sjálvsagt fekk avleiðingar fyri hana.

Ad. 8. pkt.
Tulkingin hjá Heilsurøktarafelagnum av orðingunum hjá Tórshavnar kommunu, viðvíkjandi valinum hjá A, enn einaferð ikki at vilja góðtaka eina avgerð hjá leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, fer langt út um tað, sum orðingarnar leggja upp til.

Ásannandi, at orðingarnar eftir øllum at døma geva Heilsurøktarafelagnum eina fatan av, at Tórshavnar kommuna vil nýta tað sum agarevsing, um starvsfólk nýta sín demokratiska rætt til at leggja eitt mál fyri t.d. Løgtingsins umboðsmann, verður hervið staðiliga afturvíst, at tað er nakað hald í tulkingini hjá felagnum.

Í hesum sambandi verður víst til málið um flyting, har Tórshavnar kommuna fleiri ferðir mælti A til at venda sær til Løgtingsins umboðsmann við málinum fyri at fáa eina óhefta meting av málinum, men hon valdi heldur í fleiri mánaðir at draga málið út við m.a. at draga táverandi borgarstjórn, eins og onnur starvsfólk og avvarðandi á stovninum uppí, og enntá meldaði sína leiðslu til løgregluna.

Tað, sum Tórshavnar kommuna royndi at føra fram, men Heilsurøktarafelagið - tilvitað ella ótilvitað - yvirtulkar, er at vísa á ein reyðan tráð, har Tórshavnar kommuna metir, at A til d.d. ongantíð hevur mett seg eiga nakra ábyrgd av at tryggja eitt samstarv við leiðsluna og/ella onnur starvsfólk.

Við øðrum orðum metir Tórshavnar kommuna, at A ongantíð enn hevur mett, at leiðslan á Heilsu- og umsorganartænastuni hevur havt rætt til at taka avgerðir, sum væl at merkja ikki ganga hennara áhugamálum á møti.

Samanumtikið verður mett, at tað als ikki er ósakligt at nýta eitt ógvusligt starvsfólkamál sum grundarlag fyri at sýta fastari setan, tá tað einans er áleið eitt ár fráliðið, frá at málið endaði, til starvsfólkið aftur søkir starv hjá sama arbeiðsgevara.

Tórshavnar kommuna hevur við hesum ikki fleiri viðmerkingar til málið."

Tann 5. oktober 2018 vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu sendar klagaranum til kunningar, samstundis sum umboðsmaðurin boðaði frá, at um umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá felagnum innan 2 vikur, varð farið undir endaligu viðgerðina av klaguni.

Við skrivi, dagfest 17. oktober 2018, sendi Heilsurøktarafelagið umboðsmanninum viðmerkingar til skrivið frá Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum vóru ein endurtøka av sjónarmiðunum í klaguni og øðrum skrivum í hesum máli. Skrivið er ikki tikið við í álitið.

Við skrivi, dagfest 25. oktober 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Tórshavnar kommunu til kunningar, samstundis sum umboðsmaðurin boðaði frá, at um umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Tórshavnar kommunu innan 2 vikur, varð farið undir endaligu viðgerðina av klaguni. Tann 13. november 2018 varð farið undir endaligu viðgerðina av klaguni.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, hvørt Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavnar kommuna í eitt ikki nærri tilskilað tíðarskeið kann nokta at seta klagaran í fast starv við teirri grundgeving, at Tórshavnar kommuna ikki hevur álit á henni.

Klagarin hevur síðani oktober 2017 starvast sum tímaløntur heilsurøktari á B. Í januar 2018 søkti hon um fast starv, sum Tórshavnar kommuna lýsti leyst at søkja. Klagarin var einasti umsøkjari til starvið, og ein samdur setanarbólkur mælti til at seta klagaran í starv.

Heilsu- og umsorganartænastan tók ikki undir við tilmælinum og sendi 6. februar 2018 klagaranum soljóðandi avslag uppá starvsumsóknina:

> "Hendan avgerð er grundað á, at Heilsu- og umsorganartænastan ikki hevur tað álit á tygum sum starvsfólk, sum er heilt grundleggjandi í viðurskiftunum millum starvsfólk og Tórshavnar kommunu sum arbeiðsgevari.
>
> Vantandi álitið er grundað á atburð tygara í sambandi við málið viðvíkjandi flyting frá D til B, har tygum fóru út um alt mark fyri, hvat kann góðtakast av Tórshavnar kommunu.
>
> Tórshavnar kommuna metir, at tíðin enn ikki er búgvin til at bjóða tygum fast starv, og hetta viðførir sostatt, at tygum ikki verða sett í starv sum heilsurøktari á B í hesum umfari."

Viðurskiftini, sum Tórshavnar kommuna vísti til í skrivinum, snúgva seg um, at Tórshavnar kommuna í august 2016 flutti starvsstaðin hjá klagaranum av D til B. Klagarin byrjaði tó ongantíð í hesum starvinum, og 31. januar 2017 varð hon søgd úr starvi við teirri grundgeving, at Tórshavnar kommuna hevði mist álitið á henni.

Heilsurøktarafelagið metir tað ikki vera sakligt, at Tórshavnar kommuna ikki vil seta klagaran í starv grundað á viðurskifti, sum førdu til uppsøgnina av klagaranum í 2017.

Einstakir dómar viðgera spurningin, í hvønn mun ein almennur arbeiðsgevari fyribils kann nokta at seta starvsfólk í starv aftur, sum arbeiðsgevarin áður hevur sagt úr starvi, grundað á vandan fyri at líknandi støður, sum førdu til uppsøgnina, kunnu endurtaka seg.

Í U1995.621H viðurkendi Hægstirættur, at danska Kirkjumálaráðið kundi síggja burtur frá eini starvsumsókn frá einum presti, sum fyribils var loystur úr starvi (suspenderaður), til ein endalig niðurstøðu var gjørd um møguligar avleiðingar av embætisførsluni. Hægstirættur viðurkendi somuleiðis, at Kirkjumálaráðið, tá presturin varð sagdur úr starvi, lógliga kundi boða prestinum frá, at hon í eitt tíðarskeið ikki kundi setast í starv aftur sum prestur í donsku fólkakirkjuni. Dómurin tekur tó ikki beinleiðis støðu til, hvussu langt hetta tíðarskeið kundi vera. Tað framgongur av dóminum, at presturin varð søgd úr starvi í mars 1987, og at Kirkjumálaráðið uppá fyrispurning frá prestinum í desember 1988 boðaði frá, at ætlanin hevði verið, at treytin um tíðaravmarkingina einans skuldi standa við í eitt stutt tíðarskeið. Hægstirættur helt seg ikki hava grundarlag fyri at siga, at longdin á tíðarskeiðinum var ósakligt ella órímiligt.

Eystari Landsrættur viðurkendi í U2016.1363Ø, at Region Sjælland, í sambandi við, at 3 sjúkrarøktarfrøðingar vórðu burturvístir, kundi seta treytir um framtíðar setanir á stovnum innan setanarøkið. Sjúkrarøktarfrøðingarnir høvdu givið einum fjórða sjúkrarøktarfrøðingi sterkan heilivág til egna nýtslu. Eystari Landsrættur metti viðurskiftini vera revsiverd sum tjóvarí og tilvitað brot á greiðar og grundleggjandi reglur um útlevering og handfaring av heilivági, herundir reglurnar um, at einans læknar hava rætt at fyriskriva heilivág. Á hesum grundarlagi kom Eystari Landsrættur til ta niðurstøðu, at tað var sakligt og í tráð við lutfalsmeginregluna, at teir tríggir sjúkrarøktarfrøðingarnir komandi 6 mánaðirnar ikki kundu setast í starv aftur á sjúkrahúsinum, og at tær fyribils ikki kundu røkja størv innan setanarøkið, sum gav teimum atgongd til heilivág, ella sum kravdu, at tær høvdu við heilivág at gera. Seinna treytin stóð við í út við 2 ár.

Samanumtikið kann sigast, at arbeiðsgevari lógliga og sakliga kann nokta at seta áður uppsøgd starvsfólk í starv aftur, um treytirnar, herundir hvussu langt tíðarskeiðið tað snýr seg um, stendur mát við orsøkina til uppsøgnina.

Grundarlagið fyri uppsøgnini av klagaranum í januar 2017 er ikki ein partur av klaguviðgerðini. Viðgerð mín fevnir tí um, hvørt tað var sakligt og rímiligt av Tórshavnar kommunu at nokta at seta klagaran í fast starv aftur í eitt tíðarskeið uppá í minsta lagi 2 ár.

Treytin var sambært grundgevingini hjá Tórshavnar kommunu 6. februar 2018 tíðaróavmarkað, sbr. orðini "*Tórshavnar kommuna metir, at tíðin enn ikki er búgvin til at bjóða tygum fast starv*." Í útgreinandi viðmerkingum til Heilsurøktarafelagið tann 8. mars 2018 nýtir kommunan orðingina *"... at A í rúma tíð enn má vísa vilja til at sannføra leiðsluna..."* og viðmerkir, at ein uppsøgn sum tann í ítøkiliga málinum í minsta lagi má hava gildi líka leingi, sum ein ávaring vanliga hevur, t.v.s. áleið 2 ár.

Sambært omanfyri nevndu dómum skal gerast ein samlað meting av treytunum, herundir tíðaravmarkingini, samanborið við uppsagnargrundina. Í dómunum vóru orsøkirnar til uppsagnirnar í tí eina førinum, at presturin ikki varð mettur egnað at røkja starvið, og í hinum førinum, at sjúkrarøktarfrøðingarnar høvdu framt revsiverdar gerðir og grovt mishildið setanarsáttmálan. Hvørgin dómurin stuðlar sjónarmiðinum hjá Tórshavnar kommunu um, at tað er sakligt at áseta, at klagarin grundað á uppsagnarorsøkirnar ikki kann søkja starv í kommununi í eitt tíðarbil uppá í minsta lagi 2 ár.

Sambært skjølunum í málinum viðgjørdi Tórshavnar kommuna ikki spurningin um ikki at seta klagaran í fast starv aftur, fyrr enn hon søkti fast starv á B. Tað hevði sjálvsagt verið rættast, um Tórshavnar kommuna viðgjørdi og boðaði klagaranum frá hesum, samstundis sum hon varð søgd úr starvi.

Tá hetta er sagt, so haldi eg ikki, at Tórshavnar kommuna í februar 2018 hevði nakað sakligt grundarlag fyri at nokta at seta klagaran í lýsta starvið. Hetta grundi eg á, at klagarin um hetta mundið hevði starvast sum tímaløntur heilsurøktari á B í Tórshavnar kommunu í meira enn 4 mánaðir. Eg haldi tað tí vera ósakligt, tá Tórshavnar kommuna nýtir vantandi álit sum grundgeving fyri ikki at seta klagaran í fast starv, samstundis sum Tórshavnar kommuna hevur klagaran í starvi og í verki hevur álit á henni sum tímalønt starvsfólk. Eftir mínum tykki kann grundgevingin um vantandi álit ikki lagast eftir setanarforminum á henda hátt.

Í sínum ummæli av klaguni, dagfest 4. juni 2018, orðar Tórshavnar kommunu seg í støðum á ein hátt, sum eg als ikki haldi sømir seg einum almennum myndugleika og arbeiðsgevara. Tað snýr seg m.a. um hesar orðingar:

> “...
> A velur enn einaferð at nokta at fylgja eini avgerð hjá leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, og tekur sostatt enn ein “dyst” móti at kalla somu leiðslu sum seinast.
> ...
> At A longu nú velur at reisa enn eitt mál móti leiðsluni í Heilsu- og umsorganartænastuni, staðfestir enn einaferð, at A annaðhvørt ikki vil, ella megnar, samstarv við leiðsluna. Og við hesum staðfestir A sjálv, at Tórshavnar kommuna onga orsøk hevur at hava álit á henni.”

Tá klagarin í januar 2018 søkti um fast starv á B, hevði Tórshavnar kommuna ongantíð boðað henni frá síni støðutakan um ikki at vilja seta hana í fast starv í eitt tíðarskeið. Tórshavnar kommuna hevur tí einki grundarlag fyri at staðfesta, at klagarin, við at søkja starvið, ikki virðir leiðsluna.

Tað er ein demokratiskur rættur hjá øllum starvsfólkum at venda sær til fakfelagið um starvsfólkaviðurskifti og eisini at klaga til mín fyri at fáa eina meting av, um eitt mál er rætt

handfarið av einum almennum myndugleika og arbeiðsgevara. Øll skulu kunna gera brúk av hesum amboðum uttan at óttast starvsrættarligar avleiðingar ella onnur tiltøk. Tað kann tískil als ikki góðtakast, at Tórshavnar kommuna umrøður hetta sum, at klagarin ikki virðir leiðsluna, ikki er samstarvssinnað, ella at hetta staðfestir, at Tórshavnar kommuna onga orsøk hevur at hava álit á henni.

Vísandi til, at eg ikki haldi grundgevingina hjá Tórshavnar kommunu fyri ikki at seta klagaran í fast starv vera sakliga, fari eg at heita á Tórshavnar kommunu um at viðgera hetta málið einaferð enn og lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður